

## Amerikanarar keypa sær vápn

Hóast amerikanarar kæra seg um, at teir hava minni pengar at ráða yvir orsakað av fíggjarkreppuni, so keypa teir framvegis minst líka nógv vápn sum undan kreppuni. Tað sæst eisini á virðisbrævamarknaðinum. Har eru at kalla øll virðisbrøv minkað í virði, men um somu tíð er virðið á partabrøvunum í skammbyrsufyritøkuni Smith & Wesson næstan tvífaldað. Summir eygleiðarar siga, at fólk eru farin at leggja vápn inn undir seg, tí Barrack Obama, forseti, hevur sagt, at hann fer at hækka avgjaldið á hondvápnum.

# Hetta gera vit aldrin aftur

**– Vit hava ringar royndir av at vísa samfelagssinni, so tað verður ikki við góðum, at lønarhækkingarnar verða strikaðar, sigur Vár í Gong, forkvinna hjá sjúkrarøktarfrøðingunum**

LØNARSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta líkist ongum av Anfinni Kallsberg!

Vár í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, átalar harðliga útsøgnina hjá Anfinni Kallsberg, formanni í fíggjarnevndini, í Sosialinum í gjár um, at tað einasta rætta at steðga øllum lønarhækkingum tey næstu árini, bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa búskapin aftur.

Hon heldur ikki, at slíkar útsøgnir gagna ikki nøkrum sum helst, serliga nú Fíggjarmálaráðið hevur lagt upp til betri samskiftið við fakfeløgini.

Hon staðfestir, at sjúkrarøktarfrøðingarnir eru ein láglønarbólkur og ætlar Løgtingið at lækka nakrar lønir, verða tað tær høgu lønirnar, sum skulu lækkast, áðrenn bólkarnir við teimum lægru lønunum verða rørdir.

- Tað verða ikki vit, sum skulu fyrst niður í løn, leggur hon afturat.

### Betri kort á borðið

Forkvinnan í sjúkrarøktarfrøðingafelagnum sigur, at tað skulu nógv betri grundgevingar á borðið, áðrenn tey góðtaka at seta lønarsteðg í gildi.

Lønarhækkingarnar í fjør og fyrrárið fóru mest til eftirløn og annað og lønarhækkingunum, sum er avtalað fyrst í oktober í ár, hevði verið tann hækkingunum, sum veruliga hevði sæst aftur á sjálvari lønini, so tað verður ikki við góðum, at vit góðtaka, at hækkingum verður strikað.

Hon leggur kortini afturat, at tey hava ikki fingið tosað saman um útsøgnina hjá formanninum í fíggjarnevndini.

Hon leggur afturat, at sjúkrarøktarfrøðingarnir hava ikki serliga góðar royndir av at vísa samfelagssinni.

- Tað gjørdu teir í nítiárini, saman við øðrum fakfeløgunum, tá ið lønirnar beinleiðis lækkaðu, men tá ið tíðirnar batnaðu, hækkaðu lønirnar ikki aftur.

Og hetta er ein spurningur, sum fyllir nógv í hugaheiminum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum.

- Næstan á hvørjum einasta fundi, vit hava, staðfesta sjúkrarøktarfrøðingarnir, at hetta gera vit aldrin aftur, sigur Vág í Gong.

Hon sigur, at tað sær út til, at fakfeløgini skulu bara vísa samfelagssinni tá ið tað gongur illa, men tá ið tíðirnar batna, er ongin vilji til at geva teimum alment løntu nakrar sømdir aftur.

Hon væntar eisini, at fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum fara at tosa saman um málið.



*- Vit skulu ikki bara bukast niður í ringum tíðum, tí í góðum tíðum, fáa vit ongar sømdir, sigur Vár í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*

## 18 eysturslavonar hava fingið varandi uppihaldsloyvi

ÚTLENDINGAR

Danski ráðharrin í innflytaramálum hevur í brævi til Høgna Hoydal upplýst, at 18 av teimum 22 eysturslavonunum hava fingið varandi uppihaldsloyvið í Føroyum.

Málið um varandi uppihaldsloyvi til eysturslavonarnar er nú partvíst avgreitt. Tað hevur Birthe Rønn Hornbæk, danski ráðharrin í innflytaramálum váttað.

Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, hevur sett ráðharranum § 20 spurning um málið og fekk í fyrstu atløgu svarið, at ráðharrin hevði givið boð um, at málini skuldu avgreiðast sum skjótast.

- Í dag hevur Høgni Hoydal, í framhaldi av § 20 spurninginum, fingið váttað frá ráðharranum, at 18 av teimum 22 málunum nú er avgreidd, sigur Norðuratlantsbólkurin í tíðindaskrivi.

Í svarinum skrivar Birthe Rønn Hornbech:

- I forlængelse af min besvarelse af S 1845 vedrørende meddelelsen af tidsubegrænset opholdstilladelse til en gruppe på 22 personer fra Østslavonien, kan jeg oplyse, at der på nuværende tidspunkt er meddelt tidsubegrænset opholdstilladelse i 18 af de 22 sager.

# Bústaðarpakkin fyri tingið

BÚSETING
*Tíðindaskriv*

Samlaði Bústaðarpakkin er nú latin Løgtinginum.

Ætlanin við bústaðarpakkanum er at víðka um møguleikarnar og útboðið á bústaðarmarknaðinum.

- Bústaðarpakkin er størsta frambrot á føroyska bústaðarmarknaðinum í áratíggju. Í dag eru bústaðarmøguleikarnir í okkara samfelag skerdir. Nógv tann størsti parturin av útboðnum á bústaðarmarknaðinum eru sethús, tvíhús ella raðhús. Ungar familjur, sum vilja hava føtur undir egið borð, noyðast at skuldarbinda seg fyri milliónа upphæddir. Fólk við lágari inntøku hava lítlan og ongan møguleika at ogna sær egnan bústað. Eldri fólk hava ikki møguleika at skifta hús síni út við eina bíligari íbúð. Við Bústaðarpakkanum fáa hesir samfelagsbólkar størri frælsi at velja og ogna sær bústað, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Bústaðarpakkin er settur saman av trimum pørtum: Lutaíbúðalógini, leigulógini og broytingar í skattalóggávuni. Endamálið er:

- at skapa eitt størri og meira fjølbroytt útboð á bústaðarmarknaðinum
- at geva fólki við lágari inntøku betri møguleika at ogna sær egnan bústað
- at skipa viðurskiftini á leigumarknaðinum
- at skapa størri virksemi í samfelagnum



Lutaíbúðalógin ger tað møguligt at fyriskipa bygging av lutaíbúðum í Føroyum. Ásetingar í lógini gera tað eisini møguligt at skipa vardar bústaðir til fólk við serligum tørvi, sum skulu skipast sum serstøk lutaíbúðarfeløg.

Leigulógin skal regulera leigumarknaðin og setir minstukrøv til leigusáttmálar fyri at tryggja rættindi hjá leigara og útleigara. Málið er at eggja fólki at leiga út og harvið økja um útboðið á leigumarknaðinum.

Broytingarnar í skattalóggávuni innibera m.a., at lutaíbúðarfeløg verða javnstillað við privatpersónar, sum byggja sær hús, viðvíkjandi MVG-endurgjaldi og rentustuðli.